# Krevja at fáa grótið í Lopra

**Sumbingar mótmæla, at Landsverkfrøðingurin hevur latið vágbingar fáa grótið, sum varð sprongt úr Sumbiarbergholinum. Kommunan hevur nú biðið sakførara kanna málið, tí hon hevur sjálv brúyk fyri øllum grótinum**



*MSumbiar Bygdaráð kann fegnast um stóra framgongd í kommununi. Ætlanin er m.a. at byggja havnina í Lopra út, men stóri spurningurin er, um tað eydnast at fáa grótið, sum tey siga, at Landsverkfrøðingurin hevur lovað teimum. Men semja er um at gera tað, sum gerast kann og nú kannar sakførari málið. Hinumegin borðið siga f.v. Niclas Hentze, Jacob Poulsen og Snæbjørn Vestergaard. Hesumegin borðið, við rygginum til, er tað Poul Johannus Poulsen, fremst og Jacob Vestergaard, borgarstjóri*

SUMBA:
*Áki Bertholdsen*

Træta hevur nú tikið seg upp ímillum Sumbingar og vágbingar um, hvør av teimum skal eiga grótið, sum varð sprongt úr Sumbiarbergholinum.

Grótið, sum varð sprongt úr bergholinum liggur í Lopranseiði, men nú hevur træta tikið seg upp um, hvør av teimum báðum grannakommununum, Vágur ella Sumba, hevur rættin til grótið.

Landsverkfrøðingurin hevur játtað Vágs kommunu grótið til at brúka til kommunalar útbyggingar, eitt nú til at fylla út framvið sjónum fyri at gera havnalagið størri.

Men Sumbiar Kommuna tvíheldur um, at Landsverkfrøðingurin hevði longu frammanundan játtað Sumbiar kommunu rættin til grótið.

Málið var fyri á bygdaráðsfundi í Sumba mánakvøldið

Bygdaráðið heldur, at Landsverkfrøðingurin kundi ikki lova grótið burtur tvær ferðir, men av tí at avtalað varð gjørd við Sumbiar Kommunu fyrst, er tað tann avtalan sum er galdandi og ikki avtalan, sum seinni er gjørd við Vágs Kommunu.

– Landsverkfrøðingurin hevur m.a. boðað frá, at hann heldur, at grótið kemur betri til nyttu aðrastaðni (í Vági, blm), tí Sumbiar Kommuna hevur onga ítøkiligar ætlanir um útbyggingar, har brúk er fyri tí, upplýsti borgarstjórin, Jacob Vestergaard.

Men hetta vil bygdaráðið ikki góðtaka, tí tey halda ikki, at Landsverkfrøðingurin eigur at leggja seg út í, nær kommunan byggir út.

Borgarstjórin sigur, at tað er eisini brot á gamla siðvenju at lata grótið aðrar vegir.

– Landsverkfrøðingurin hevur altíð havt tað siðvenju, at í sambandi við tunnilsgerðir eigur kommunan, sum arbeitt verður í, eisini grótið, sum er sprongt burtur.

## Sakførari kannar málið

Á fundinum mánakvøldið gjørdi bygdaráðið av at gera tað, sum gerast kann fyri at Sumbiar Kommuna skuldi fáa grótið.

Eitt nú hevur kommunan biðið sakførara kanna málið.

Avtalan ímillum Landsverkfrøðingin og Sumbiar Kommunu um grótið, er ikki skrivlig, men munnlig.

– Men ein munnlig avtala er líka nógv verd sum ein skrivlig avtala, er niðurstøðan hjá sakførararanum hjá kommununi.

Bygdaráðið skal nú senda sakføraranum ymisk skjøl, eitt nú gerðarbøkur hjá bygdaraðnum, har ymisk mál eru umrøtt á fundi útfrá teirri fortreyt, at avtalað er við Landsverkfrøðingin um at fáa grótið.

Og tað hevur tað verið oftani, varð upplýst á bygdaráðsfundinum.

Hetta skal gerast fyri at undirbyggja, at Landsverkfrøðingurin hevur gjørt avtalu við Sumbiar Kommunu um at hon skuldi fáa grótið.

## Fáa 20.000 kubikk

Mett verður, at tilsamans eru tað eini 100.000 kubikk av gróti, sum liggja í Lopranseiði.

Hvussu nógv av tí, sumbingar fáa er enn ógreitt.

Tað einasta, sum er greitt, er, at teir nú fáa 20.000 kubikk, tað hevur kommunan fingið skrivligt loyvi til frá Landsverkfrøðinginum.

Grótið skal brúkast til at fylla upp framvið havnalagnum í Lopra, har brúk er fyri størri keiøki.

Men kommunan hevur brúk fyri øllum grótinum, tí metingar vísa, at skal alt tað fyllast út, sum kommunan ætlar, verða tað brúk fyri 120.000 kubikkum av gróti, tí tað er rættiliga djúpt ov víðført.

Jacob Vestergaard sigur, at tað er brúk fyri at gera havnalagið størri, fyri at skapa møguleikar til at byggja virki, um áhugi er fyri tí.

Á fíggjarætlanini komandi ár er ætlanin at seta 450.000 krónur av at koyra tey 20.000 kubikkini av Lopranseiði oman í Havnina.

Men sum eitt lið í arbeiðnum at bøta um havnalagið, er tað eisini eitt uppskot í fíggjarætlanini, at seta 100.000 krónur av til at asfaltera vegin í Ónavík, har havnin er í Lopra er og harumframt er ætlanin at seta 175.000 krónur til at stoypa eitt stykki niðri á havnalagnum, sum frammanundan er planerað.





# Søguligt fólkatingsval 20. november

**Danir og føroyignar skulu 20 . november velja nýggjar fólkatingslimir. Ikki óvæntað verður valið sama dag, sum kommunu- og amtsráðsval verða í Danmark, og tað er ongantíð hent áður**

*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*



Tað verður fyrstu ferð í søguni, at danir skulu velja nýggjar limir í Fólkatingið, kommunustýrini og amtsráðini sama dag.

Tann støðan er serlig, segði Poul Nyrup Rasmussen, tá hann á tíðindafundi í Forsætisráðnum á middegi í gjár, almannakunngjørdi avgerðina um at skriva út nýval til Fólkatingið.

– Men tað er eisini ein nýggj og serstøk støða, vit eru í, segði forsætisráðharrin og sipaði til yvirgangin í USA, kríggið í Afghanistan og ótryggu støðuna, sum hevur valdað síðani yvirgangsálopini í september.

– Í einari truplari tíð hava vit brúk fyri einum nýggjum og styrktum mandati. Tað er okkara áheitan á donsku veljararnar, segði Poul Nyrup Rasmussen.

## Ikki óvæntað

Søgurnar um eitt fólkatingsval 20. november hava gingið sum heitt breyð hesa seinastu vikuna, og tey flestu roknaðu við, at Nyrup fór at taka endaligu avgerðina heilt skjótt.

Valstríðið er tí at kalla byrjað í Danmark, longu áðrenn valið er útskrivað, og hetta er ein av orsøkunum til, at forsætisráðharrin gjørdi av at skriva út nýval.

– Eg havi hugsað um hetta. Havi vigað fyrimunir og vansar. Og tað er mær greitt, at Danmark hevur ikki brúk fyri trimum til fýra mánaðum, sum uttan iva fara at verða merktir av valstríðið. Tað er ikki gott fyri avgerðirnar, sum skulu takast. Tað er ikki tað besta, sum vit kunnu gera fyri Danmark. Tí haldi eg tað vera best at áseta ein felags valdag fyri Fólkatingið, kommunurnar og amtini, segði Nyrup sum grundgeving fyri at skriva út valið nú.

## Yvirgangur verður tema

Veljarakanningarnar seinastu vikuna hava uttan iva eisini vigað tungt, tá ið Nyrup gjørdi av at skriva út nýval. Sambært teimum liggur danski Javnaðarflokkurin betri fyri nú, enn hann hevur gjørt líka síðani seinasta fólkatingsval í 1998. Ein av orsøkunum til hetta er handfaringin hjá stjórnini av støðuni síðani yvirgangsálopini í september. Nyrup fær toppkarakter frá donsku veljarunum, og hann vil hava ágóðan av hesum viðrákinum, áðrenn tað er ov seint.

Nyrup nevndi tí beinleiðis yvirgangin, kríggið og ótryggu støðuna fleiri ferðir, tá hann helt tíðindafundin í forsætisráðnum.

Stjórnin ætlar at leggja fleiri lógaruppskot fram komandi tíðina, sum skulu gera tað lættari at avdúka yvirgangsfólk og herða revsingina fyri yvirgang. Eisini skulu lógirnar um innflytning gerast strangari. Eisini skal fíggjarlógin fáast uppá pláss í einari tíð, har heimsbúskapurin er viknaður nógv og vandin fyri niðurgangstíðum er stórur. Tað eru hesi tiltøkini, sum Poul Nyrup Rasmussen millum annað vil hava fólksins stuðul til á komandi fólkatingsvalinum.

Løgmaður:

# Fólkaflokkurin ynskir borgarliga stjórn

**Løgmaður, Anfinn Kallsberg, var ikki beinleiðis skakaður av tíðindunum um, at Poul Nyrup Rasmussen hevði útskrivað val. Hann sigur, at Fólkaflokkurin kundi ynskt eina borgarliga stjórn, men væntar ikki, at Føroyar verða nakar stórur spurningur í danska valstríðnum**

VAL
*Heri á Rógvi*



Tað var ein eftir umstøðunum rættiliga róligur Anfinn Kallsberg, sum vit hittu í telefonini mikumorgunin, beint eftir, at Poul Nyrup Rasmussen hevði kunngjørt, at Fólkatingsval verður 20. november. Anfinn Kallsberg segði, at hetta sjálvandi var ógvuliga stutt tíð at fyrireika seg, men sigur samstundis, at hetta nú einaferð er soleiðis sum skipanin virkar. Tað kemur heldur ikki heilt óvæntað á løgmann, at Nyrup velur at skriva út val nú. Hann leggur dent á, at tað er danski forsætisráðharrin, sum útskrivar val, og hetta er hann eisini heimildaður til.

Løgmaður vísir á, at hetta kanska er tað landsstýrið, sum hevur havt mesta samskiftið við donsku stjórnarleiðarinar, so hetta fer væntandi at seta sín dám á, samstundis sum tað ikki ber til at fornokta, at ríkisrættarliga støðan fer at ávirka komandi fólkatingsvalið.

Løgmaður væntar ikki, at Føroyar verða nakar stórvegis spurningur í danska valstríðnum, tá ið Poul Nyrup meira hevur lagt dent á altjóða viðurskifti. Hann sigur ógvuliga diplomatiskt, at tað verða donsku og eisini føroysku veljararnir, sum fara at avgera, hvør skal seta út í kortið í donskum politikki næstu fýra árini.

Anfinn Kallsberg sigur, at Fólkaflokkurin til komandi fólkatingsvalið fer at leggja dent á tann politkk, sum flokkurin stendur fyri. Tað verður leiðslan í landsfelagnum fyri flokkin, sum ger at avgera, hvør skal stilla upp til valið. Hann vil hvørki vátta ella nokta, at hann sjálvur fer at stilla upp til valið. Fólkaflokkurin hevur landsfund um vikuskiftið, og tað kann, sambært løgmanni, væl hugsast, at fleiri týdningarmiklar avgerðir í sambandi við valið vera tiknar tá.

Lisbeth L. Petersen:

# – Vit vilja hava sessin aftur

**– Vit halda tað vera sjálvsagt, at Sambandsflokkurin skal hava annan sessin í Fólkatinginum, og tað fara vit at stríðast fyri, sigur forkvinnan í Sambandsflokkinum**

VAL
*Eyðun Klakstein*

Sambandsflokkurin ætlar sær at vinna annan av føroysku sessunum í Fólkatinginum aftur, eftir at Javnaðarflokkurin fór við hesum sessi á seinasta vali.

– Vit hava góðar vónir um, at vit kunnu vinna fólkatingssessin aftur, heldur Lisbeth L. Petersen.

– Sjálvt um stutt tíð er til valið, so eru vit klár til valið, tí vit hava eina greiða stevnuskrá. Vit vilja endurreisa álitið millum føroyskar og danskar myndugleikar, eftir at sitandi landsstýrið hevur oyðilagt so nógv á hesum øki, sigur hon.

Tað var sera tætt, tá Javnaðarflokkurin fór við sessinum hjá Sambandsflokkinum á seinasta Fólkatingsvalið, og hetta gjørdist bjargingin hjá Poul Nyrup Rasmussen, sum helst hevði fallið, um tveir borgarligir limir komu úr Føroyum.

# Klárur til valið

**Javnaðarflokkurin er klárur til at fara undir valstríðið til fólkatingsvalið. Stutt er síðan landsfundin, og har varð nýggja stevnuskráin, sum flokkurin fer at arbeiða eftir, kunngjørd**

FÓLKATINGSVAL
*Edvard Joensen*

Jóannes Eidesgaard, formaður og fólkatingsmaður fyri Javnaðarflokkin, sigur, at flokkurin er klárur at fara til val. Stevnuskráin er løgd, og verður brúkt til valstríðið hetta fram til 20. november.

Tað kom ikki óvart á Jóannes Eidesgaard, at val varð útskrivað nú, sigur hann. Hann er staddur í Danmark í Fólkatingsørindum, men væntar at koma heim til Føroya sum skjótast, tí uppstillingin verður avgreidd fyrsta dagin, sigur hann.

Jóannes Eidesgaard sigur, at einki er avgjørt um, hvør fer at stilla upp. Men hann væntar at verða á listanum, og hann ætlar at taka av, verður hann biðin.

Valstríðið fer uttan iva í stóran mun at bera brá av, at løgtingsval eisini stendur fyri durum.

– Eingin ivi er um, at flokkarnir fara at royna ymisk ting yvir fyri hvørjum ørðum, sum viðkoma løgtingsvalinum í eins stóran mun sum fólkatingsvalinum, sigur hann.

Jóannes Eidesgard heldur, at nú er brúk fyri politikarum, sum kunnu vísa á, hvussu vit kunnu koma burtur úr tvaðpottinum, vit hava staðið í seinastu fýra árini, har alt hevur snúð seg um fullveldismálið hjá samgonguni. Hann væntar kortini, at samgongufloKkarnir fara at draga tað málið inn í valstríðið sum høvuðsmálið.

Javnaðarflokkurin fer tó at vísa á, at tað veruliga ber til at koma víðari. Tað verður gjørt við at leggja fram ta uppskotið til sjálvstýrislóg, sum flokkurin fyrr hevur boðað frá, sigur Jóannes Eidesgaard.

Tjóðveldisflokkurin:

# Ikki tikið støðu

**Tjóðveldisflokkurin fer at kalla inn til eyka flokstíng, har støða floksins í sambandi við komandi fólkatingsvalið verður umrødd. Sætið á danatingi skal nýtast at fremja føroyskt sjálvstýri, sigur formaðurin**

FÓLKATINGSVAL
*Stefan í Skorini*

Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, sigur, at flokkurin enn ikki hevur tikið støðu til, um hann fer at bjóða seg fram at umboða føroyingar í Fólkatinginum. Kallað verður inn til eyka flokstíng, har avgerðin verður tikin á hægsta stigi í flokkinum.

– Tað hava altíð verið ymsar hugsanir um fólkatingsumboðanina í Tjóðveldisflokkinum. Grundleggjandi eru vit ímóti hava umboð í tinginum hjá danska fólkinum, men hinvegin hevur tað týdning fyri føroyskt sjálvstýri, og tí hava vit síðan 1971 stillað upp til fólkatingsvalið, sigur Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal sigur eisini, at umboðanin hjá Jóannesi Eidesgaard á Fólkatingi hevur verið ein beinleiðis forðing í arbeiðnum hjá landsstýrinum fyri fullveldi í hesum valskeiðnum.

Tí kann tað vera týðandi partur í aðalmálinum hjá Tjóðveldisflokkinum at hava eitt umboð í danska tinginum. Erlendur Patursson varð valdur tvær ferðir í sjeytiárunum, men síðani hevur Tjóðveldisflokkurin ikki havt umboð í tinginum.

Tjóðveldisflokkurin vónaði annars, at føroyska umboðanin á Fólktingi var at enda komin eftir hetta valskeiðið, men so skuldi ikki ganga.

– Hetta verður eitt val, har vit hava møguleikan at fokusera á støðu Føroya í heiminum. Ein fortreyt fyri at vera við í teimum stóru avgerðunum, sum verða tiknar í heiminum í dag, er at hava fult sjálvstýri, sigur Høgni Hoydal, ið eisini sær hetta valið sum eina meiningakanning til komandi løgtingsval.

Um Tjóðveldisflokkurin fær umboð í Fólkatingið, er ætlanin ikki at luttaka í tí dagliga tingarbeiðnum, men tað verður við tí fyri eyga at arbeiða fyri føroyskum sjálvstýri.